

*Havnar Arbeiðsmannafela hevur fingið Eivind Mohr, listamálara at mála eina mynd av Karl Johansen. Hon varð avdúkað sunnudagin sman við nevndini í Havnar Arbeiðsmannafelag*



*Fleiri kend andlit vóru á móttøku á Hafnina sunnudagin at ynskja Karl Johansen tillukku við teimum 25 árunum sum formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag*



*Karl Johansen prátar við Katrina Dahl Jakobsen, løgtingskvinnu*



*Jóannes Ejdesgaard ynskti gott samstarv við Havnar Arbeiðsmannafelag*



*Vilhelm M. Johannesen, formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag helt, at Karl hevur verið ein góður formaður*

# Heiðraðu Karl

**Heilt nógv var á móttøku at heiðra Karl Johansen, nú hann hevur verið formaður í Havnar Arbeiðsmannafelagi í 25 ár**

HÁTÍÐARHALD
*Áki Bertholdsen*

Rættiliga nógv fólk varð komið saman seinnapartin sunnudagin at heiðrað Karl Johansen, nú hann hevur verið formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag í 25 ár.

Á møttøkuni á Hotel Hafnina fingu fólk gløgg, holukakur, kaffi, te og smákakur og eyðvitað vórðu eisini nógvar heilsanir bornar fram, umframt at hann fekk ein hóp av blomstrum frá fólki, sum vildu ynskja honum tillukku.

Havnar Arbeiðsmannafelag hevði eisini biðið listarmannin, Eivind Mohr, mála ein málning av Karl og hann var avdúkaður hendan dagin.

Millum røðararnar vóru Hanus Vang, Hans Birgir Hansen, Viggo Olsen, politikararnir Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum og Jóannes Ejdesgaard, formaður javnaðarfloksins, somuleiðis ein av stóru arbeiðsgevarunum í landinum, Poul Mohr, umframt Vilhelm M. Johannesen, formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Bjarni Djurholm helt, at Karl Johansen hevði verið havnarmonnum ein góður formaður. Hann helt, at tað størsta, sum Havnar Arbeiðsmannafelag hevði fingið á skaftið í formanstíðini hjá Karl, var eftirlønargrunnurin, sum varð skipaðu fyrst í áttatiárunum.

Vilhelm M Johannesen helt eisini, at Karl hevði verið ein góður formaður fyri Havnar Arbeiðsmannafelag og hann ynskti honum eisini alt gott framyvir. Men hann takkaði eisini Karl fyri hansara máta at vera upp á, tí hann hevði verið góður at telva við, hóast teir báðir ikki telva við sama liti.

Jóannes Eidesgaard ynskti eins gott samstarv við Havnar Arbeiðsmannafelag sum tað hevði verið higartil, tí hann helt at javnaðarflokkurin og Havnar Arbeiðsmannafelag vóru runnin av somu rót og tí høvdu felags áhugamál.

Hann helt, at hóast vit kundu hava lyndi til at halda, at fakfelagspolitikkur var sjálvsagdur, hevði tað stóran týdning ikki at gloyma tey stóru rættindi, sum fakfelagsrørslan hevur vunnið verkafjøldini, átta tíma arbeiðsdag, løn í reiðum pengum og munandi lønarhækkingar.

Poul Mohr hevði eisini eftirlønargrunnin á munni og helt, at hetta var tað størsta, sum var hent í Havnar Arbeiðsmannafelag.

– Hetta er ein grunnur, sum arbeiðsgevararnir betala til við gleði, segði Poul Mohr- og tað átti hann at vita, tí hann er ein av allarstørstu arbeiðsgevarum í landinum.



# Atlantic Airways heiðrað í Berlin



*Atlantic Airways hevur vunnið virðisløn í Berlin síðst í november í ár*

Síðst í november mánaði varð Atlantic Airways heiðrað við triðju virðisløn við Scandinavian Travel Award 2001 í Berlin. Atlantic Airways fekk triðju virðisløn í bólkinum fyri besta ferðamál/ bestu ferðaskrivstovu fyri felagsins av pakkaferðum og faldaran »Färoer Inseln«, sum umframt rundferðaruppskot eisini bjóðar ein hotellista og eina fjølbroytta skrá við gongutúrum, siglitúrum og øðrum.

– Vit fingu bjóðað at vera við, og valdu at taka av, sigur Magni Arge, stjóri á Atlantic Airways.

– Eg dugi ikki at siga, hvønn týdning hetta hevur fyri okkum enn, men hetta var ein virðisløn sum er um ferðamál í Skandinavia. Hetta kemur sjálvsagt at vera ein liður í eini víðari menning á tí týska marknaðinum.

Týski marknaðurin er ein ógvuliga stórur marknaður, tí har er so nógv at velja ímillum. Tí er tað ringt at gera vart við seg, og ikki drukna millum øll hini tilboðini, sum eru. Magni Arge sigur, at Atlantic Airways hevur ikki gjørt so nógv við at marknaðarføra seg har niðri, og tí kemur henda virðislønin ógvuliga væl við, tí hon vekir jú ans.

Skandinavian Travel Award er ein viðurkend virðisløn í Skandinavia, og hon verður latin fyri bestu ferðamannatilboðini í Norðurlondum. Millum grundgevingarnar fyri virðislønina eru sera góð avrik í sambandi við tænastu, dygd og samskifti við viðskiftafólkini. Viðrislønirnar vórðu handaðar á eini gallaveitslu í sambandi við Skandinavientage í Berlin.

– Vit eru bæði fegin og errin um, at okkara framleiðsla og faldari eru so væl móttikin í Týsklandi, og vit vóna og vænta okkum munandi framgongd á týskaferðamarknaðinum komandi árini, sigur Magni Arge.

Vælumtókta týska ferðabókaforlagið Nordis, sum hevur útgivið ferðabøkur og tíðarrit um millum annað Norðurlond, stendur fyri Scandinavian Travel Award.

# Fleiri bilar ferðast til Havnar

FERÐSLA
*Ingrid Bjarnastein*

Talið á bilum, sum koyra til Havnar, hvønn dag er vaksandi. Teljistaðurin eitur Hoydalsá, Tórshavn – Hoydalar.

Síðani 1995 hevur verið ein støðug vaksan í ferðsluni til og frá Havnini. Sambært árbókini er talið vaksið við 1382 bilum pr/samdøgur. Hetta kann eisini hava okkurt við vaksandi bilatalið í Føroyum at gera.

Tað er ikki bert til og frá Havnini at ferðslan økist. Eisini á Lambareiði, tað vil siga inn til Runavíkar og víðari út á Toftir, er bilatalið pr/samdøgur vaksið við knøppum 1000 bilum.

# Flest føroyingar eru kirkjufólk

KIRKJAN
*Ingrid Bjarnastein*

84,4% av fólkinum í Føroyum eru kirkjufólk. Somikið staðfestir nýggja árbókin fyri Føroyar.

Í flest øllum býum og bygdum í Føroyum eru nærum allir íbúgvarnir skrásettir sum kirkjufólk. Í nøkrum av teimum smærru bygdunum er enntá alt kirkjufólk. Herav kann nevnast Hestur, Nólsoy, Bøur, Skálavík, Saksun og aðrar bygdir.

Í Tórshavnar kommunu búðu í ár 2000 17.748 fólk. Av hesum eru 15.230 kirkjufólk. Hetta gevur okkum eitt prosenttal áljóðandi 85,8%.

Føroya næststørsta kommuna, Klaksvík, hevði í ár 2000 4780 íbúgvar. Herav vóru 3190 kirkjufólk. Tað vil siga, at 66,7% av klaksvíkingum eru kirkjufólk.

Fægst kirkjufólk eru í Hvannasundi. 63,5% av teimum 449 borgarunum í Hvannasundi eru kirkjufólk.


